# Ford umhugsa at selja Jaguar

**Hóast Jaguar telist millum fínastu bilmerkini í Evropa, gongur tað ikki heilt væl fíggjarliga hjá verksmiðjuni, sum fyri nøkrum árum síðan varð yvirtikin av Ford Motor Company**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ford stjórin William "Bill" Clay Ford Jr. Hevur biðið íløgubankan "Goldman Sachs and Bank of America" um at vurdera støðnua hjá Jaguar verksmiðjuni í Onglandi. Í USA verður hetta lagt út sum at Ford møguliga fer at sleppa sær av við Jaguar.

Um Jaguar verksmiðjan ikki verður seld, skulu stórar broytingar gerast við øllum bygnaðinum hjá Jaguar, sum tey seinastu árini hava víðkað sína vøruskrá við bilum, sum m.a. eru bygdir yvir Ford platformar.

Jaguar hava í høvuðsheitum fýra modell á marknaðinum í løtuni, tey eru: X-Type, S-Type, XJ og sportbilin XK8, sum allir fáast í ymiskum útgávum.

Teir næstu mánaðirnir verða spennandi og helst eisini avgerandi fyri framtíðina hjá Jaguar, sum er eitt av fínu bilmerkjunum hjá Ford-konsernini.



*Jaguar S-Type, ið er miðalstøddin í persónbila-røðini hjá Jaguar. Bilurin er gjørdur við Jaguar Mark II frá 60-unum sum fyrimynd*

# Roykiforboð í bilum


*Týska stjórnin leggur til rættis eitt totalt forboð móti royking - møguliga eisini í bilum frá komandi ári at rokna*

Týska stjórnin leggur til rættis eitt totalt forboð móti royking á almennum støðum, á matstovum og møguliga eisini í bilum, frá komandi ári at rokna.

Í týskum fjølmiðlum verður nógv kjakast um tað at royking er orsøk til fleiri ferðsluóhapp í týsku vegunum. Serfrøðingar á økinum vilja vera við, at tað er eins vandamikið at roykja sum at tosa í fartelefon undir koyring.

Tað eru tó ikki øll, ið eru samd um at royking er orsøk til so nógv ferðsluóhapp.

Týskir fjølmiðlar upplýsa, at í Belgia og Skotlandi var roykiforboð fyri bilførarar sett í gildi frá marts mánað í ár.


- Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
- Vit umvæla øll bilmerki
- Klárgering til sýn
- Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

**Sp/f Plátuverkstaðið**
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo

## Nissan Almera 1,6




Ein væl hildin Nissan Almera 1,6 til sølu vegna flyting.

Árg. des 1996, km. 168.000, sýnaður í des. 2005

Bilurin hevur 18" alu-felgur við nýggjum dekkum. Nýggj kavadekk á felgum fylgja við.

Prísur: kr. 45.000,-

**Tel. 216014 eftir kl. 17.00**